




## Eyðvarur trýr upp á Fugltúgvu

Eitt felag við Eyðvari Petersen á Sandi hevur keypt línuskipið Fugltúgvuna, sum P/F Torvanes á Eiði hevur átt í fleiri ár.

**Hvørji eru útlitini?**
– Tá vit eru komnir so langt, sum vit nú eina ferð eru, so hava vit eisini góðar vónir. Fiskaprísirnir eru hampiligir, men vit vóna, at teir fara at kvinka nakað uppeftir, so teir verða betri, enn teir hava verið seinastu tíðina. Tað sigur Eyðvarur Petersen við Útvarpið hjá Kringvarpinum.

**Hvussu nógv skal Fugltúgvan fiska fyri, um raksturin skal hanga saman?**
– Ætlanin heldur fíggjarliga, um tað eydnast okkum at fiska fyri einar 12 miljónir krónur um árið.

**Hvar fara tit at fiska?**
– Fugltúgvan fer fyrst og fremst at royna undir Føroyum. Við keypinum fylgja 135 fiskidagar. Haraftrat eigur skipið eina kvotu undir Íslandi á 460 tons í rundari vekt.

**Er skipið mannað?**
– Enn er einki gjørt við at finna manning til skipið, men tað verður nú. 14 man verða við Fugltúgvuni, sigur Eyðvarur Petersen

# 378 pedagogar av Læraraskúlanum

Í sambandi við, at 26 pedagogar fríggjadagin vórðu útskrivaðir av Læraraskúlanum, varð upplýst, at samlaða talið á pedagogum, sum hava lokið prógv á Frælsinum, er 378 – 336 konufólk og 42 mannfólk.

Seinnapartin fríggjadagin var samkoma á Føroya Læraraskúla í sambandi við, at 26 pedagogar høvdu lokið útbúgvingina og fingu handað prógv.

Á samkomuni varð upplýst, at hetta var síðsta ferðin, at pedagogar tóku prógv sambært útbúgvingarskipanini soleiðis, sum hon hevur verið, síðani farið varð undir pedagogútbúgving í Føroyum í 1986.

Fyrstu pedagogarnir við útbúgving á Læraraskúlanum tóku prógv í 1990. Fríggjadagin vórðu pedagogprógv handað á Frælsinum fyri 22. ferð. 26 fingu prógv hesa ferð – 24 konufólk og tvey mannfólk.

Samlaða talið á pedagogum, sum hava lokið prógv á Læraraskúlanum, er nú komið upp á 378. Kynsbýtið millum teir 378 pedagogarnar, sum síðani 1990 eru útskrivaðir, er 42 mannfólkfólk og 336 konufólk.




***Pedagogarnir, sum vórðu útskrivaðir av Føroya Læraraskúla fríggjadagin 4. februar 2011:***
*Aftast frá vinstru: Sonja Olsen, Fríða Petersen, Rúna Gaardbo Petersen, Eiler Sørensen, Tórfríð Tavsen, Laila Æðustein Thomsen, Kári Troest.*
*Í miðjuni frá vinstru: Anja Jacobsen, Elisa Hjørdis Joen-Jacobsen, Kaja Joensen, Jannet Johannesen, Joan Evi Johannesen, Ingun Johansen, Sunrid Lamhauge, Aðalbjørg Linklett, Kristrunn Nicodemussen.*
*Fremst frá vinstru: Elly Katrine Andersen, Nicolina Bára Andersen, Birita Arge, Tinna Dahl, Rúna Skoubo Dalsgaard, Poula Skorheim Guttesen, Sigga Guttesen,Jónleyg E. J. Hansen, Emily Hansen, Sóley Hansen*

## Í MORGIN

**2/5 °C**




Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin upp í strúk av landsynningi og regn. Hitin millum 2 og 5 stig.

## MIKUDAGIN

**3/6 °C**




Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitint millum 3 og 6 stig.

## HÓSDAGIN

**4/7 °C**




Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi. men væntandi turt. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og fríggjadagin yvirhøvur turt, men leygardagin regn. Hitin millum 4 og 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 987 hPa. yvir Íslandi fer eystureftir og grynnist.




**Komandi nátt:**
Ein veikur hátrýstryggur yvir Íslandi verður yvir Føroyum týsdagin. Eitt djúpt lágtrýst, í landsynning úr Hvarvinum fer spakuliga norðureftir og brúgvaløgini haðani nærkast Føroyum týskvøldið.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 95 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -5 | Tromsø | -- | Moskva | 0 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 2 | Bergen | 0 | Berlin | 5 | Beijing | 0 |
| Tórshavn | 4 | Oslo | -9 | Paris | 13 | New Dehli | 19 |
| Lerwick | 3 | Stokkhólm | -4 | Madrid | 8 | Bangkok | 31 |
| Aberdeen | 4 | Keypmannah. | 0 | Róm | 13 | Sydney | -- |
| London | 13 | Helsinki | -6 | Malorca | 16 | New York | 0 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 3. febr. | Tendring |
| 6. febr. | Mánin longst frá jørðini |
| 11. febr. | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. feb. | 07:36 | 19:56 | 06:36 | 18:56 | 06:51 | 19:11 | 09:36 | 21:56 | 10:36 | 22:56 | 05:51 | 18:11 | 04:51 | 17:11 | 07:51 | 20:11 | 08:51 | 21:11 | 07:21 | 19:41 | 08:36 | 20:56 |
| 5. feb. | 08:16 | 20:34 | 07:16 | 19:34 | 07:31 | 19:49 | 10:16 | 22:34 | 11:16 | 23:34 | 06:31 | 18:49 | 05:31 | 17:49 | 08:31 | 20:49 | 09:31 | 21:49 | 08:01 | 20:19 | 09:16 | 21:34 |
| 6. feb. | 08:53 | 21:11 | 07:53 | 20:11 | 08:08 | 20:26 | 10:53 | 23:11 | 11:53 | - | 07:08 | 19:26 | 06:08 | 18:26 | 09:08 | 21:26 | 10:08 | 22:26 | 08:38 | 20:56 | 09:53 | 22:11 |
| 7. feb. | 09:29 | 21:46 | 08:29 | 20:46 | 08:44 | 21:01 | 11:29 | 23:46 | 00:11 | 12:29 | 07:44 | 20:01 | 06:44 | 19:01 | 09:44 | 22:01 | 10:44 | 23:01 | 09:14 | 21:31 | 10:29 | 22:46 |
| 8. feb. | 10:03 | 22:22 | 09:03 | 21:22 | 09:18 | 21:37 | - | 12:03 | 00:46 | 13:03 | 08:18 | 20:37 | 07:18 | 19:37 | 10:18 | 22:37 | 11:18 | 23:37 | 09:48 | 22:07 | 11:03 | 23:22 |